Lasse Borðoy, stjóri í Atlantic Supply Base:

# – Øll bíða eftir Hess




*Lasse Borðoy, stjóri í Atlantic Supply Base í Runavík góðar vónir fyri framtíðina, hóast tað ikki var nøkur innrás í føroyska básin á oljumessuni í Stavanger herfyri*
*Mynd Jan Müller*

**Hóast avmarkaður áhugi var fyri at vitja føroyska básin á oljumessuni í Stavanger herfyri, so ber stjórin í Atlantic Supply Base, Lasse Borðoy ongan ótta fyri oljutilgongdini við Føroyar. Hann telist millum teirra, sum trúgva uppá oljuna og vónar, at okkurt fer at spyrjast burtur úr boringini hjá Hess hinumegin markið**

OLJA
*Jan Müller*

Er tað nøkur føroysk fyritøka, sum veruliga á “egnum kroppi”, hvat tað vil siga at skula bíða eftir oljuboring á landgrunninum, er tað Atlantic Supply Base í Runavík. Fyritøkan er sum so eisini tann fyritøkan í landinum, sum hevur einamest fyri oljuleitingina at gera. Men hóast steðgur er í borivirkseminum eina tíð, so hava teir á støðini ikki mist mótið og sita eiheldur hendur í favn og bíða.

Lasse Borðoy, stjóri dylur ikki fyri, at teir kunnu ikki sita og bíða í allar ævir, men hann hevur kortini vónir um, at olja verður funnin. Tí er tað eisini umráðandi hjá teimum at fylgja við og vera hjástaddir, har nakað hendir á oljuøkinum. Tað var tí eisini einki minni enn ein sjálvfylgja, at teir vóru við á altjóða oljumessuni í Stavanger nú um dagarnar.

Hesaferð ætlaðu teir hjá Atlantic Supply Base at hava sín egna bás á oljuframsýningini ONS. Teir hava verið við saman við Menningarstovuni í fleiri ár, men hildu tað vera ov dýrt, hels tí  at støðið varð so høgt. Teir vildu tí royna at vera fyri seg hesaferð. Tá teir valdu at taka verandi básin varð ikki greitt, um Menningarstovan var við. Endin varð so, at Menningarstovan, sum vanliga skipar fyri slíkum oljumessum vegna føroyskar fyritøkur gavs við hesum arbeiði og lat tað upp í hendurnar á Oljuvinnufelagnum, sum tá skuldi umboða føroyska vinnulív. Endin var at umleið 12 fyritøkur ynsktu at vera við, eitt munandi minni tal enn til undanfarnar framsýningar – men tó ikki óvæntað orsakað av tí steðgi, sum er í leitivirkseminum í løtuni.

Tá avtornaði vórðu tað so Atlantic Supply Base og Oljuvinnufelagið, sum stóðu fyri føroyska básinum. Og hetta gekk sum skilst eisini sum fótur í hosu. Básin hevði Vasti í Klaksvík sett upp og tók hann seg eisini væl út. Rúmligur og opin og kortini lættur at fáa eygað á. Men sum vera man og vælskiljandi – við óvissuni um Føroyaøkið í huganum - var ikki júst nakar gravgangur eftir at støkka inn á gólvið hjá teimum føroysku fyritøkunum. Men hetta nervar ikki stjóran í Atlantic Supply Base. Hann vísir á, at hetta er ein støða, sum so mong lond í eini leitifasu kenna til. Og tá hugsað verður um tann áhuga og tað fokus, sum er á risastóru norsku útbyggingunum av gassfeltum sum Ormen Lange og Snøvit, er tað als ikki so løgið, at eitt nú so fáir norðmenn vitja føroyska básin. Hann er bara ikki “in” í løtuni.

- Eg havi tosað við nógv fólk, sum hava vitjað básin. Tey eru øll púra greið yvir, hvat hendir í Føroyum. Tey vistu alt um boringarnar og hvat fór at koma. Ein verkfrøðingur segði tað so beinrakið: “Vi sidder bare og venter.”

Lassse Borðoy vísir á, at tey, sum eru við á oljumessuni, eru fyri tað mesta undirveitarar, og teir vita, at har arbeiði er, har eru teir eisini klárir. Nú bíða so eisini teir eftir úrslitinum av Hessboringini. Um hon verður væleydnað, so kunnu vit rokna við, um ikki eini innrás, tó so at nógvir undirveitarar aftur fara at vísa Føroyum stóran áhuga.

Teir føroyingar, sum hava áhuga í at vera við í oljuvinnuni og vísa ein veruligan áhuga og eru klárir ikki bara, tá borað verður men kanska eitt sindur áðrenn eisini, teir sleppa upp í part fyrr ella seinni er Lasse Borðoy vísur í.  Við klárir meinar hann eisini, at oljufeløgini leggja  stóran dent á, at feløgini kunnu vísa á, at tey veruliga í longri tíð hava roynt at koma sær upp í hesa vinnuna og ikki bara vilja sleppa framat, tá sáttmálarnir koma á borðið.

Krøvini til kvalitets-stýring ol. eitt nú krøv til “track history” tvs. hevur tú ikki verið uppi í og roynt teg, so hevur tú onga søgu at vísa á og stendur altíð eitt stig aftanfyri útlendingar.

- Hevur tú ikki roynt at koma uppí og roynt at arbeiða miðvíst, so hevur tú ein trupulleika, tá ástendur.

Eitt dømi um eitt slíkt virki, sum skilagott hevur fylgt tilgongdini heldur Lasse Borðoy vera El-Service. Tað er eitt felag, ið miðvíst hevur samstarvað við aðrar undirveitarar aðrastaðni. Tá hesir so hava brúk fyri at koma til Føroya, stendur føroyska felagið klárt til at fara inn og gera uppgávur.

Hóast ikki so nógv fólk vitjaðu føroyska básin - júst í hesi bíðitíðini á landgrunninum -  so heldur Lasse sostatt, at tað er týdningarmikið hjá hesum virkjum at vera við fyri m.a. at kunna tosa við og hitta umboð fyri aðrar undirveitarar, sum tey ein dag kunnu fáa brúk fyri at samstarv við.

- Teir undirveitarar, sum skulu lata vørur og tænastur til oljuídnaðin, um oljuvinna tekur seg upp í Føroyum, eru fult út greiðir yvir, hvat hendir. Teir sita bara og bíða leggur hann aftrat.



*Frá føroyska básinum í Stavanger*
*Mynd Jan Müller*



# Útgerðarhavnin brúkar bíðitíð til førleikamenning




*Hóast umboð fyri føroyska kommunur eru meira varnar nú, tá tað snýr seg um oljutilgongdina, so vóru umboð fyri býráðið í Runavík við til oljumessuna í Stavanger herfyri, har teir eitt nú vitjaðu føroyska tjaldið, ið Tórshavnar kommuna hevði tikið stig til*
*Mynd Jan Müller*

**Í Runavík vóna tey, at boringin hjá Hess hinumegin markið verður so mikið væleydnað, at Hess fer at bora fleiri avmarkingarbrunnar aftrat á landgrunninum næsta ár**

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Nú útgerðarstøðin í Runavík bíðar eftir at borað verður aftur á føroyskum øki spurdu vit stjóran Lassa Borðoy, hvussu Atlantic Supply Base klárar  at yvirliva, nú lítið og einki virksemi er?

- Vit hava brúkt hetta árið til førleikamenning. Vit hava fingið nakað av stuðuli av hesi konto og hava eisini  sent fólk at arbeiða á útgerðarstøðum í Noregi, soleiðis at vit eru "up to date", tá arbeiðsuppgávur aftur verða í Føroyum. Men sjálvandi kunnu vit ikki halda fram á henda hátt ár eftir ár, men vit vita, at henda fyrsta útbjóðingarrundan heldur fram til 2006, og so mugu vit fáa at síggja, hvussu verður eftir tað.

Útgerðarhavnin í Runavík hevur avtalu við oljufeløgini, sum bora við Føroyar um at brúka havnina har. Trý av feløgunum hava borað hvør sín brunn, og Agip skal bora sín næsta ár. Samrøður eru longu millum Agip og útgerðarhavnina, soleiðis at allar fyrireikingar eru uppá pláss, áðrenn borurin verður settur í.

Tað ljóðar, at Agip kanska fer at bora longu í mai næsta ár og heldur tað, so ætlar útgerðarhavnin at lata porturini upp longu ein mánaða áðrenn sigur stjórin. – Vit byrja kanska longu í mars, apríl, soleiðis at alt er klárt til Agipboringina. Lasse Borðoy fylgir annars sera væl við, hvat hendir á Atlantsmótinum og vónar hann við fleiri, at boringin hjá Hess hinumegin markið fer at geva so mikið gott úrslit, at Hess eisini fer at bora ein ella fleiri avmarkingarbrunnar á føroyskum øki næsta ár. Tað kann geva nógv arbeiði til útgerðarhavnina í Runavík.

Tað verður annars ikki fyrr enn pallarnir liggja har árið runt, tvs. tá tað verður framleiðsla, at tað verður nakað veruligt at fara eftir í Føroyum heldur hann.

Atlantic Supply Base er annars farið undir at gera eina frágreiðing um støðina og framtíðar møguleikar hennara. Tað er Teitur Poulsen, sum saman við Lassa Borðoy, ið ger hesa frágreiðing, ið verður liðug í november. Har verður roynt at lýsa fyrimunirnar við at brúka eina føroyska heldur enn eina útlendska útgerðarhavn.

Lasse Borðoy er annars ikki hugstoyttur av, at eitt nú Amerada Hess, sum borar við markið, ikki brúkar teirra útgerðarstøð. Hann ásannar, at her er talan um eina boring í bretskum øki, og tá skulu teir helst brúka Aberdeen. Men so skjótt teir fara at bora okkara megin aftur, so er tað greitt, at nógv verður at gera í Runavík. Og tað er hetta teir bíða eftir.

Vit spurdu Lassa Borðoy, um hann ikki ikki ótta fyri, at útgerðarhavnin fyrr ella seinni skal enda í Suðuroy, tí politiski viljin kann verður tann í framtíðini!

– Tað eg havi skilt er, at man politiskt ikki er hugaður fyri at fara inn og broyta støðuna og út frá einum politiskum kravi at flyta útgerðarhavnina. Eg haldi eisini, at tað var rætt av politikarunum at lata upp til oljufeløgini at gera av, hvar útgerðarhavnin skuldi liggja, og eg vóni ikki, at hetta verður broytt. Teir skulu ikki taka okkum, tí vit liggja í Runavík. Men teir skulu gera tað, tí vit annaðhvørt kunnu verða bíligari ella kunnu lata nakað annað og betri  enn aðrir.



*Frá oljumessuni í Stavanger*
*Mynd Jan Müller*